almannaverkið

# Umsókn um ískoyti til stakútreiðslur

Eftir § 19, stk. 1 í lóg um almannatrygd og tænastur

## Upplýsingar umsøkjarans

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn | | P – tal | |
| Navn* | hjúnafelagi ☐ sambúgvi ☐ | P – tal | |
| Bústaður | | Telefon | |
| Býur | Postnr. | Fartelefon | |
| Teldupostur | Kommunulækni | | |

*Vinaliga set x við hjúnafelaga ella sambúgva

## Onnur vaksin í húskinum (18 ár og eldri),

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn | | P – tal | |
| Navn | | P – tal | |
| Navn | | P – tal | |
| Navn | | P – tal | |

## Umsókn um

| | |
|---|---|
| Hvat verður søkt um stuðul til at gjalda | |
| Mettur kostnaður, kr. | |

## Samband við Almannaverkið

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hevur tú nú ella áður havt samband við Almannaverkið? | Ja | ☐ | Nei | ☐ |
| Um ja, nær (umleið) | | | | |

## Fíggjarviðurskifti

Við umsóknini skulu leggjast **váttanir um tínar føstu útreiðslur** (kvittanir, váttanir um flytingar ella annað), herundir **húsaútreiðslur** (láns- ella leiguútreiðslur), **SEV, olju, heilsutrygd, barnaansing** og so framvegis.

*Um tú, í sambandi við aðra umsókn innanfyri teir seinastu mánaðirnar, hevur latið inn útreiðsluskjøl, er ikki neyðugt at lata tey inn einaferð aftrat.*

## Bankakonta

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skrás. Nr. | | Kontonummar | | Peningastovnur | |

## Váttan

Undirritaði/a váttar við hesum, at upplýsingarnar omanfyri og upplýsingar latnar saman við hesum umsóknarblað eru rættar. Eg gevi Almannaverkinum loyvi til at útvega sær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina, herundir upplýsingar frá lækna, øðrum viðgera, peningastovnum og skattamyndugleikanum.

| | Dagfesting | Undirskrift |
|---|---|---|
| Umsøkjari | | |
| Hjúnafelagi | | |



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

# Umsókn um ískoyti til stakútreiðslur

Eftir § 19, stk. 1 í lóg um almannatrygd og tænastur

## Upplýsing um treytir og annað

Almannaverkið ger, sum grundarlag fyri avgerðini um ískoyti, eina ítøkiliga meting av viðurskiftunum hjá tí einstaka umsøkjaranum, herundir av fíggjarligu viðurskiftunum (inntøku, útreiðslum og ogn) og av tí neyðuga og rímiliga í útreiðsluni (herundir av kostnaðinum).

Tað er ein fyritreyt fyri at fáa ískoyti, at umsøkjarin hevur verið fyri broytingum í sínum viðurskiftum, eini sonevndari almannahending, til dømis at umsøkjarin hevur átt ella skal eiga barn, er vorðin sjúkur, arbeiðsleysur, skildur, einkja ella einkjumaður.

Sum høvuðsregla er galdandi, at hjá einum umsøkjarin, sum fær fult endurgjald fyri mistu inntøkuna, til dømis frá barnsburðargrunninum ella sjúkradagpengaskipanini, er ikki grundarlag fyri at veita ískoyti til stakútreiðslur. Er inntøkuendurgjaldið partvíst, til dømis frá Arbeiðsloysis- ella sjúkradagpeninga-skipanini, kann ískoyti koma uppá tal.

Tað er ein treyt, at almannahendingin hevur havt við sær, at umsøkjarin ikki er førur fyri at útvega sær og sínum neyðugan pening til viðkomandi stakútreiðslu, og at hann ikki kann bíða við at seta seg fyri útreiðsluni til hann aftur kemur í vinnu.

Tað er somuleiðis ein treyt, at útreiðslan er vanlig og verður mett rímilig og neyðug. Og at tað er ein útreiðsla, sum eisini fólk við lægri inntøkum undir vanligum umstøðum hava ráð til. Sum nøkur dømi um stakútreiðslur kunnu nevnast pinkubarnaútgerð, lutir til innbúgv, onkur hvítvøra, brillur og annað tílíkt.

Hevur umsøkjarin ella hjúnafelagin ogn av týdningi, sum - beinleiðis ella við sølu av ogn - kann dekka útreiðsluna, verður ískoyti ikki veitt. Partvíst ískoyti kann verða veitt, um ognin einans lutvíst kann dekka viðkomandi útreiðslu.

Ein meting verður gjørd av inntøkum og rímiligum føstum útreiðslum hjá umsøkjaranum. Ein tørvsútrokning verður gjørd, har fastar útreiðslur og ein upphædd til uppihalds (til mat, klæði og tílíkt) verða settar upp ímóti inntøkuni. Mett verður á henda hátt, um yvir-/undirskot er og harvið, um umsóknin skal verða játtað ella sýtt og um møguligt ískoyti skal vera fullt ella partvíst. Upphæddin til uppihalds er føst og er tann sama sum grundupphæddin í fólkapensjónini.

Vísir tørvsmetingin, at umsøkjarin hevur undirskot, er grundarlag fyri játtan. Hevur umsøkjarin yvirskot, ið kann dekka útreiðsluna, verður umsóknin sýtt. Er yvirskot, sum tó ikki dekkar alla útreiðsluna, er grundarlag fyri at veita partvíst ískoyti.

Fyritreytin fyri at fáa eina fasta útreiðslu tikna við í tørvsútrokningina er, at útreiðslan er skjalprógvað. Tí hevur tað týdning at leggja kvittanir, váttanir um flytingar og tílíkt við umsóknini.

Umsøkjarin eigur at senda umsókn til Almannaverkið, áðrenn hann bindir seg til útreiðsluna. Stuðul verður ikki veittur til útreiðslur, sum umsøkjarin hevur átikið sær, áðrenn Almannaverkið hevur tikið avgerð um játtan.

**Umsóknin skal sendast ella latast Almannaverkinum.**



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo